FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Námsskipan fyri M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði

Fróðskaparsetur Føroya

INNIHALD


Fororð til tey lesandi frá Lestrarráðnum......................................................3

1 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum ......................................................5

2 Útbúgvingarstig 5
3 ECTS-áseting 5
4 Upptøkukrøv 5
4.1 Upptøkukrøv 5
4.2 Ískoytiskrøv 6
4.3 Avmarkingar í upptøku av lesandi 6
5 Endamál við útbúgvingini 7
6 Lýsing av almennum og fakligum førleikum 7
6.1 Lýsing av almennum og fakligum førleikum á M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði 7
7 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini) 9
7.1 Bygnaður í útbúgvingini 9
7.2 Innihald og ECTS á einstøku skeiðunum 11
7.2.1 Fyrsta lestrarhálvan 12
7.2.2 Næsta lestrarhálvan 12
7.2.3 Triðja lestrarhálvan 12
7.2.4 Fjórða lestrarhálvan 13
7.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini 13
7.4 Starvsvenjing 14
7.5 Ritgerðir (lýsa karmar í mun til bachelor og master) 14
7.6 Metingarhættir (formativ og summativ meting) 15
7.7 Próvtøkur 16
7.7.1 Almennar reglur um próvtøkur 16
7.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini 16
7.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming 17
7.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið 17
7.7.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka 17
7.7.6 Serlig atlit 18
7.8 Undirvísingarmál 18
7.9 Góðskriving 18
7.10 Farloyvi 19
7.11 Serlig atlit (sjúka, brek og annað) 19
7.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar (t.d. lestrarvist) 19
7.13 Luttøkuskyldu 19

7.14 Lestrarvirkni ..... 19
7.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum ..... 19
7.16 Kærumøguleikar ..... 20
7.17 Vísindaligt rættlæti ..... 20
7.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv ..... 20
7.19 Treytir um broyting í námsskipan ..... 20
7.20 Aðrar ásetingar ..... 21
7.20.1 Útskriving ..... 21
7.20.2 Samskifti ..... 21
7.20.3 Lestrarárið ..... 21

## Fororð til tey lesandi frá Lestrarráðnum.

Í námsskipanini eru grundreglurnar fyri tykkara lestur. Tí hevur tað alstóran týdning, at tit lesa og skilja hana. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum, er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum tit eiga at brúka. Á tann hátt kunnu tit kenna tykkara rættindi og tykkara skyldur. Sambært viðtøkunum fyri Lestrarráð skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari

avgreiðslu. Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini. Henda námsskipanin er góðkend av Lestrarráðnum á Søgu- og samfelagsdeildini tann 10. september í 2023.

On behalf of the Board of Studies



Tróndur Møller Sandoy, Chairman

# Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði lýst. Við heimild í Løgtingslóg nr. 58 frá 9 juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, og Kunngerð nr. 97 frá 17. juni 2021 ásetur námsskipanin innihaldið í útbúgvingini og reglurnar fyri, hvussu útbúgvingin verður útint. Útbúgvingin fylgir somuleiðis Bolognayvirlýsingini um eina felags evropeiska útbúgvingarskipan, og er skipað eftir hesum leisti. Í námsskipanini eru ikki skeiðslýsingar fyri tey einstøku skeiðini, tó er innihald og vavið stutt lýst. Skeiðslýsingar og almennar reglur hjá Setrinum eru at finna á heimasíðu Setursins. Dekanurin hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av útbúgvingini, og útbúgvingarleiðarin hevur ta fakligu ábyrgdina. Námsskipanin lýsir eisini krøvini til tann lesandi umframt rættindi og skyldur hjá tí lesandi.

## 1 Heitið á útbúgvingini á føroyskum og enskum

Útbúgvingin gevur rætt til heitið *M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði*. Enska heitið er *M.S.Sc. in Social Science and Political Science*.

## 2 Útbúgvingarstig

Master “Second Cycle” sambært QF – EHEA og stig 7 sambært EQF - LLL.

## 3 ECTS-áseting

Master ”Second Cycle” 120 ECTS.

Útbúgvingin er ein granskingargrundað fulltíðarútbúgving, sum er ásett til 120 ECTS. 1 ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar hjá tí lesandi. Eitt lestrarár við fulltíðarlestri er 60 ECTS svarandi til eina metta arbeiðsbyrðu á 1500-1800 tímar. Tá er allur lestraraktivitetur íroknaður.

Námsstig (ECTS) er ein roknieind fyri støddina á einum skeiði og arbeiðsbyrðuna hjá tí lesandi. Hon verður uppgjørd eftir evropeisku ECTS skipanini (European Credit Transfer System). Hetta er ein felags skipan, sum ger tað lættari at flyta avrik millum lond og útbúgvingar.

Flestu skeiðini telja 10 ECTS, og svarar hetta til 250-300 arbeiðstímar hjá tí lesandi til hvørt skeiðið. Ein fulltíðarlesandi hevur 30 ECTS hvørja lestrarhálvu, og skal tí í miðal rokna við at brúka 750-900 arbeiðstímar hvørja lestrarhálvu. Talan er tó altíð um eina miðal meting.

## 4 Upptøkukrøv

### 4.1 Upptøkukrøv

Fortreytin fyri upptøku er, at viðkomandi hevur staðið bachelorútbúgving í samfelagsvísindum ella stjórnmálafrøði.

Um umsøkjarin hevur aðra bachelorútbúgving, skal umsøkjarin hava í minsta lagi 60 ECTS av samfelagsvísindaligum ella stjórnmálafrøðiligum skeiðum. Í hesum føri byggir avgerðin á eina heildarmeting av umsóknini.

Í heilt serligum føri kann víkjast frá hesum krøvum, um umsøkjarin á annan hátt hevur ognað sær vitan og lestrarførleika, ið kann javnsetast við viðkomandi bachelorútbúgving. Í hesum føri byggir avgerðin á eina heildarmeting av umsóknini. Saman við umsóknini skulu umsøkjarar senda eitt skriv, har grundgivið verður fyri umsóknini.

## 4.2 Ískoytiskrøv

- Førleikar í samfelagsvísindaligum háttaløgum:
  At hava staðið í minsta lagi (vanliga 20 ECTS ella samsvarandi) skeið í samfelagsvísindaligum háttalagi. Hesi skeið skulu vera í minsta lagi á bachelorstigi. Upptøkunevndin metur í hvørjum einstøkum føri, hvørt upptøkukrøvini eru uppfylt.
- Málsligir førleikar:
  Fyri at kunna standa útbúgvingina er neyðugt, at tann lesandi hevur førleikar at lesa og tulka føroyskar, enskar og danskar tekstir. Somuleiðis er neyðugt, at tann lesandi hevur førleikar at skriva uppgávur, íroknað masterritgerðina, á einum av omanfyri nevndu málum.

Lestrarráðið tekur avgerðir um frávik frá hesum reglum.

## 4.3 Avmarkingar í upptøku av lesandi

Avmarkingar eru í, hvussu nógv lesandi verða tikin inn. Hesar avmarkingar verða ásettar á hvørjum ári og kunngjørdar sambært almennu reglunum á Setrinum.

Umsóknir um upptøku verða viðgjørdar við støði í, hvørji upptøkukrøv eru til masterútbúgvingina. Harumframt eru avgerðir hjá upptøkunevndini grundaðar á talið á lesandi, sum frammanundan eru á útbúgvingini eins og eina meting av, hvørt tann lesandi megnar at fylgja skeiðum, sum eru farin í gongd.

Setrið tilskilar sær rættin til ikki at taka lesandi inn, um so er at ov fáir skikkaðir umsøkjarar eru.

Setrið hevur serligar mannagongdir til masterlesandi, ið vilja flyta frá einum øðrum fróðskaparsetri til Setrið. Í slíkum føri kunnu lesandi seta seg í samband við lestrarvegleiðarar ella útbúgvingarleiðaran. Fleiri upplýsingar eru at finna á heimasíðu Setursins: https://setur.cdn.fo/media/7806/kunnger%C3%B0-98-juni-17-2021.pdf?s=TFwjkiwra63ecq9DudbCU5ymZFI

# 5 Endamál við útbúgvingini

Endamálið við útbúgvingini er at úbúgva tann lesandi í stjórnmálafrøði og samfelagsvísindi og at geva teimum lesandi førleikar at nýta ástøði og háttaløg. Umframt hetta er endamálið – við ástøðiligum og metodiskum amboðum – at fata, tulka og greina vísindaligar spurningar innan stjórnmálafrøði og samfelagsvísindi. Endamálið er harafturat at menna førleikar at nýta vísindaliga vitan í verki, at duga at síggja glopp í nýggjari vitan og leggja fram nýggj og nýhugsandi vísindalig úrslit. Strembanin eftir hesum krevur sjálvstøðugt arbeiðslag og evni at fata evnislagað mál og tværvísindaligar granskingarhættir og tilgongdir. Ein tann týdningarmiklasti førleikin er at megna at greina og meta um sambandið millum ástøði, háttalag, empiriskar eygleiðingar og praktiskar avleiðingar. Fyri at tryggja hesar førleikar, leggur hendan útbúgvingin dent á sjálvstøðugt arbeiðslag og gevur tí lesandi karmarnar og møguleikan at menna sín egna granskingarprofil.

# 6 Lýsing av almennum og fakligum førleikum

## 6.1 Lýsing av almennum og fakligum førleikum á M.S.Sc. í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði

| Almennir førleikar | |
|---|---|
| Akademiskt arbeiðslag: | Dugir at hugsa og arbeiða vísindaliga, at eyðmerkja, greina og tulka, at nýta ástøði, háttalag og dátur; fatar og dugir at nýta vísindaligt ástøði, háttaløg og dátur í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði. |
| Persónligir eginleikar: | Megnar sjálvstøðuga, kritiska støðutakan, bæði tvørturum vísindagreinar eins og evnislagaðar tilgongdir í mun til egið valt fakøki. |
| Sjálvstøðugt arbeiðslag: | Dugir at starvast á høgum stigi innan politikk og umsiting, hetta við atliti til evnis-, tilfeingis- og tíðaravmarking. Harumframt at skipa professionellar uppgávur við atliti til tíðar- og fíggjarligar avmarkingar og avrik. |
| Samskiftisførleikar: | Megnar at samskifta skrivliga og munnliga í samsvari við samskiftisstøðuna, íroknað at miðla torgreidd evni til leik og lærd. |
| **Fakligir førleikar** | |
| Yrkisgrundarlag: | Dugir at vísa breiða og holla vitan um týðandi tættir í samfelagsvísindum og stjórnmálafrøði og at nýta hesa vitan í praksis. |
| Trupulleikaloysn: | Dugir at síggja evnislagað mál og átaka sær uppgávur við einum stjórnmálafrøðiligum og samfelagsvísindaligum háttalagi og granskingarhátti, umframt at arbeiða tværvísindaliga, tá uppgávan krevur vitan og arbeiðshættir, ið fara tvørtur um vísindagreinar. |

| | |
|---|---|
| Samskiftisførleikar: | Dugir at lýsa og miðla stjórnmálafrøðilig og samfelagsvísindalig mál úr fleiri sjónarhornum; dugir at kjakast og gruna um mál vísindaliga og at miðla vísindaligt tilfar munnliga og skrivliga til leik og lærd. |
| Sjálvstøða: | Megnar at síggja glopp í vitanini innan samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði og at standa á odda fyri uppgávum á høgum stigi, bæði hjá einstaklingum og bólkum. |
| Leiðsla og menning: | Megnar at taka á seg greinandi arbeiðsuppgávur fyri privatar, almennar og sjálvbodnar felagsskapir og fyritøkur, og at leggja fram væl grundað uppskot um loysn til praktiskar avbjóðingar. |

# 7 Útbúgvingarlæruúrtøkur (samlaðu yvirskipaðu læruúrtøkurnar á útbúgvingini)

Eftir lokna útbúgving er tann lesandi førur fyri at:

- Greiða frá týðandi tættum í ástøði og háttaløgum innan stjórnmálafrøði og samfelagsvísindi og at greina og nýta hesi hugtøk í praksis.
- Síggja glopp í nýggjari vitan og at leggja fram nýggja og nýskapandi vísindaliga vitan innan samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði.
- Kjakast um og meta um ymisk ástøði og háttaløg í stjórnmálafrøði og samfelagsvísindi.
- Standa á odda fyri og greiða úr hondum verkætlanir og aðrar stjórnmálafrøðiligar og samfelagsvísindaligar arbeiðsuppgávur.
- Miðla týðandi tættir í ástøði og háttalagi í samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði bæði munnliga og skrivliga.
- Finna ella leita fram viðkomandi vísindaligar tekstir, sum eru viðkomandi fyri ávís evni og temu.
- Meta um vísindaligar tekstir út frá ávísum vísindaligum trupulleikum og temum.
- Síggja evnislagað mál og nýta tvørvísindaligar granskingarhættir í vísindaligum arbeiði.
- Greina styrkir og veikleikar í ymiskum háttaløgum og mannagongdum í arbeiðinum at leita fram vísindaligt tilfar.
- Meta um og kjakast um vísindalig stríðsmál og spurningar við hegni og vísdómi.

## 7. Ásetingar um útbúgvingarviðurskifti

### 7.1 Bygnaður í útbúgvingini

Masterútbúgvingin telur 120 ECTS, sum svarar til eitt fulltíðarstarv í tvey lestrarár. Útbúgvingin er skipað í 4 lestrarhálvur, har hvør lestrarhálva telur 30 ECTS. Í hvørjari skeiðslýsing er ein lýsing av endamáli, innihaldi, arbeiðslagi í sambandi við læru- og undirvísing, umframt av læruúrtøkum og próvtøkuhættum sambært reglugerð fyri Fróðskaparsetur Føroya.

Skeiðini fyrstu lestrarhálvuna eru kravd. Í næstu lestrarhálvu skal tann lesandi velja skeið, sum eru viðkomandi fyri útbúgvingarleiðina. Hesi skeið kunnu annaðhvørt vera á Fróðskaparsetri Føroya ella á einum universiteti uttanlands (dømi um skeið eru at síggja undir 7.2). Útbúgvingarleiðarin og Lestrarráðið skulu undangóðkenna hesi skeið. Í triðju lestrarhálvuni er praksislæra og fyrireikandi skeið til masterritgerð (5 ECTS), sum eru grundleggjandi og

fyrireikandi til masterritgerðina, sum verður skrivað í fjórðu lestrarhálvu. Hvør lestrarhálva er nærri lýst niðanfyri.

Talva 2 Raðfylgjan í útbúgvingini

| Lestrar-hálva | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Vísindaástøði og háttalag I<br>10 ECTS | Masterverkætlan<br>10 ECTS | Samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði í smátjóðum og oyggjasamfeløgum<br>10 ECTS |
| | | | |
| 2. | Valfrí skeið á Fróðskaparsetri Føroya og/ella á universiteti uttanlands<br>30 ECTS | | |
| | | | |
| 3. | Praksislæra<br>25 ECTS | | Fyrireikandi skeið til masterritgerð<br>5 ECTS |
| | | | |
| 4. | Masterritgerð<br>30 ECTS | | |
| Samlað ECTS | 120 | | |

## 7.2 Innihald og ECTS á einstøku skeiðunum

Masterútbúgvingin er skipað stigvíst og stigvaksandi. Fyrsta lestrarhálvan er soleiðis, at umframt vanliga skeiðsluttøku er hon skipað í bæði sjálvstøðugt arbeiði og bólkaarbeiði, umframt verkætlanararbeiði. Næsta lestrarhálvan er skipað soleiðis, at tann lesandi mennir sínar førleikar annaðhvørt á Setrinum ella á einum universiteti uttanlands. Triðja lestrarhálvan leggur serligan dent á praksislæruna, sum tann lesandi eisini skrivar eina akademiska frágreiðing um, sum er grundað á eitt evnið, sum er viðkomandi í praksis og sum er valt í samstarvi við ein privatan ella almennan stovn, fyritøku ella felagskap. Harumframt endar triðja lestrarhálvan við einum fyrireikandi skeiðið til masterritgerðina (5 ECTS) sum eisini sæst omanfyri. Í fjórðu lestrarhálvuni skrivar tann lesandi við akademiskari vegleiðing sína masterritgerð.

Neyvari kunning um masterútbúgvingina, lærugreinar, læruhættir, læruúrtøkur og tíðarkarmar er at lesa í skeiðslýsingini og í lestrarhandbókini á heimasíðu Setursins. Skeiðslýsingarnar verða eisini til taks hjá teimum lesandi á talgildum pallum hjá Fróðskaparsetri Føroya.

### *7.2.1 Fyrsta lestrarhálvan*

Fyrsta lestrarhálvan er býtt upp í trý kravd skeið: Vísindaástøði og háttalag á masterstigi (10 ECTS), Samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði í smátjóðum og oyggjasamfeløgum (10 ECTS) og Masterverkætlan (10 ECTS).

Útbúgvingin byrjar við skeiði í vísindaástøði og háttalagi (10 ECTS). Skeiðið viðger epistemologiskar og ontologiskar spurningar, sum eru viðkomandi í samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði, eins og háttaløg og ymiskir hættir at savna saman dátur eisini verða tikin í nýtslu.

Skeiðið Samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði í smátjóðum og oyggjasamfeløgum (10 ECTS) leggur dent á støðd sum variabul og á samfelagsligu og politisku ávirkanina av at búgva í einum lítlum samfelagi ella í einum smástati. Innanfyri hesi granskingarøki leggur skeiðið dent á munir og líkskap millum smá og stór samfeløg, tjóðir og ríki.

Masterritgerðin (10 ECTS) er akademisk evnislagað ritgerð um eitt evni, sum tann lesandi saman við øðrum lesandi, sum hann/hon arbeiðir í bólki saman við, hevur valt. Endamalið er at skriva eina vísindaliga uppgávu um viðkomandi evni innan politikk og samfelagsvísindi.

### *7.2.2 Næsta lestrarhálvan*

Í hesari lestrarhálvuni verða tey 30 ECTS stigini sett saman av teimum skeiðum á MA stigi, sum tann lesandi sjálvur hevur valt og sum eru viðkomandi fyri hansara/hennara útbúgving, annaðhvørt í Føroyum ella uttanlands. Hendan lestrarhálvan gevur tí lesandi møguleika at ogna sær servitan í teimum evnum, sum tann lesandi hevur valt, annaðhvørt á einum hægri lærustovni uttanlands ella á Fróðskaparsetri Føroya. Útboðið av valskeiðum á Setrinum kann vera skiftandi frá ári til ár, men nøkur dømi um, hvørji valskeið verða boðin út á MA stigi eru niðanfyri:

- Demokrati og veljaraatferð (10 ECTS)
- Miðlar og politiskt samskifti (10 ECTS)
- Hagfrøði (10 ECTS)
- Umhvørvissøga (10 ECTS)
- Vinnusøga og maritim søga (10 ECTS)
- Almennur etikkur (10 ECTS)
- Smátjóðir og altjóða politikkur (10 ECTS)

Valfríu skeiðini eiga at vera viðkomandi fyri útbúgvingina og styrkja førleikarnar hjá tí lesandi. Fyri at tryggja, at tann lesandi á útbúgving sínari mennir sínari akademisku førleikar stigvíst, skulu valskeiðini, sum tann lesandi hevur valt á næstu lestrarhálvuni, góðkennast av útbúgvingarleiðara áðrenn. Øll valfríu skeiðini skulu vera á MA stigi.

Næsta lestrarhálvan fevnir um 30 ECTS.

### *7.2.3 Triðja lestrarhálvan*

Triðja lestrarhálvan hevur tvey endamál. Tað fyrra er, at tann lesandi skal fara í akademiska praksislæru á einum stovni ella felagsskapi á arbeiðsmarknaðinum, sum er viðkomandi fyri

útbúgvingina (25 ECTS). Tað seinna er, at tann lesandi stendur skeiðið Fyrireikandi skeið til masterritgerð (5 ECTS) sum er grundarlagið undir endaligu masterritgerðini.

Viðkomandi praksislæra, skal skiljast soleiðis, at tann lesandi, útbúgvingarleiðarin saman við viðkomandi stovni ella felagsskapi, koma ásamt um eina akademiska verkætlan og granskingarevni. Hendan verkætlanin skal fylgja vísindaligum grundreglum og vera liðug til ásettu tíðina. Høvuðsendamálið við praksislæruni er at styrkja førleikarnar hjá tí lesandi at greiða torgreiddar spurningar, sum eru viðkomandi fyri arbeiðsmarknaðin, serliga við at menna greinandi førleikarnar, og førleikarnar at loysa trupulleikar ella avbjóðingar. Endamálið er eisini at menna førleikarnar hjá tí lesandi í tí serøki, sum hann/hon hevur valt. Harafturat skal tann lesandi kunna knýta saman ymisk ástøði við avbjóðingar í praksis.

Avtalan millum tann lesandi og stovnin ella felagsskapin skal góðkennast av útbúgvingarleiðaranum fyri at tryggja akademisku góðskuna í praksislæruni. Tí er neyðugt, at avtalan tekur hædd fyri, at tann lesandi skal møta til undirvísing á Setrinum regluliga í hesari lestrarhálvuni, eins og at tann lesandi skal hava tíð til at skriva sína akademisku frágreiðing. Tann lesandi fær ein kontaktpersón knýttan at sær á arbeiðsstaðnum og sleppur at nýta neyðuga útgerð har, t.d. skriviborð o.a. Fyri at tryggja rætta arbeiðsumhvørvið, er neyðugt, at stovnurin ella felagsskapurin í minsta lagi má hava 3 fulltíðarstørv. Frávik frá hesum verða í hvørjum einstøkum føri mett av útbúgvingarleiðaranum.

Aftaná praksislæruna tekur tann lesandi Fyrireikandi skeið til masterritgerð (5 ECTS). Endamálið við hesum skeiðinum er at tryggja tí lesandi grundarlagið undir komandi masterritgerðini. Undirvísingin gevur tí lesandi grundleggjandi vitan og vegleiðing í at orða ein granskingarspurning, granskingarmál, menning og nýtslu av granskingarætlan, at nýta ástøði og háttalag, at savna inn dátur, at byggja upp og skipa skrivingina av verkætlanini, at skipa arbeiðið o.a. Tað er alneyðugt, at tann lesandi er virkin á hesum skeiðinum. Tann lesandi skal gera sær eina granskingarætlan, sum miðar fram ímóti endaligu masterritgerðini. Endamál, innihald, úrtøka og onnur neyvari lýsing av skeiðinum eru at lesa í skeiðslýsingini.

#### *7.2.4 Fjórða lestrarhálvan*

Fjórða lestrarhálvan er arbeiðið við masterritgerðini. Evnið í masterritgerðini skal góðkennast av útbúgvingarleiðararnum og vegleiðaranum. Góðkenningin av evninum skal taka støði í uppgávu, sum er latin inn í fyrireikingarskeiðinum til masterritgerð (5 ECTS), sum tann lesandi hevði í 3. lestrarhálvu. Masterritgerðin kann vera einstaklingaarbeiði ella bólkaarbeiði við 2-3 lesandi. Masterritgerðin skal vísa, at tann lesandi hevur hegni at nýta viðkomandi háttalag og ástøði í nýtsluni av einari sjálvstøðugari greining og tulking av einum valdum evni.

Tilfarið, ið verður nýtt til masterritgerðina, eigur at byggja á bæði primerar og sekunderar keldur um valda evnið.

### 7.3 Læru- og undirvísingarhættir í útbúgvingini

Lærugrundarlagið á masterútbúgvingini er, at tann lesandi arbeiðir sum einstaklingur, eins og hann/hon nemur sær læring í einum livandi lestrarumhvørvi. Av tí sama eru læru- og undirvísingarhættirnir á útbúgvingini soleiðis, at tann lesandi luttekur aktivt á skeiðum og í skipaðum tiltøkum s.s. verkstovum, lestarbólkum, verkætlanarbólkum osv.

Partur av ætlanini um eitt virkið samfelag við akademiskum mannagongdum, er rætturin hjá tí lesandi at fáa vegleiðing og stuðul til arbeiðið við og fullfíggjan av verkætlanum og øðrum uppgávum. Eisini eigur tann lesandi at vera virkin í arbeiðinum at menna eitt skipað akademiskt umhvørvi. Hesar ætlanir síggjast aftur í læru- og undirvísingarhættunum á útbúgvingini.

Masterútbúgvingin er serstøk 2 ára útbúgving (120 ECTS), sum byggir á tvørvísindi og samspælið millum empiriska og ástøðiliga læring. Dentur er tí lagdur á samvirkna læring gjøgnum evnislagaðar verkætlanir, samrøður, skeið, verkstovur umframt annað einstaklingaskipað og bólkaskipað læruvirksemi.

Neyvari lýsing av læru- og undirvísingarháttum á útbúgvingini eru at síggja á skeiðslýsingini fyri einstøku skeiðini á heimasíðu Setursins.

## 7.4 Starvsvenjing

Sum áður nevnt, er triðja lestrarhálvan akademisk praksislæra við støði í avtalu millum tann lesandi, Setrið og starvsplássið (sí brotið omanfyri).

## 7.5 Ritgerðir (lýsa karmar í mun til bachelor og master)

Tá tann lesandi hevur staðið 80 ECTS, hevur hann/hon rætt til at byrja uppá masterritgerðina og fáa tillutað ein vegleiðara til hetta arbeiðið. Samlaða vegleiðingartímatalið er 5 tímar, men hvussu ofta tann lesandi fær vegleiðing, verður avtalað millum vegleiðara og tann lesandi. Sama tímatalið er galdandi fyri lesandi, ið arbeiða í bólki. Áðrenn ein vegleiðingartíma, skal tann lesandi hava sent vegleiðaranum tilfar, sum hann/hon hevur skrivað. Um tann lesandi ikki hevur nakað skrivligt tilfar at senda inn, skal tann lesandi senda inn eina ætlan, og telur hendan vegleiðingin sum ein vegleiðingartími. Tíðarætlanin verður avtalað millum tann lesandi og vegleiðaran.

Í serligum føri, har lesandi hevur umbiðið hetta, kann útbúgvingarleiðarin játta fleiri tímar enn 5 til vegleiðingar.

Tann lesandi hevur tríggjar møguleikar at lata masterritgerðina inn; fyri lesandi, ið byrja masterritgerðina í januar, er fyrsta innlatingarfreist 1. juni. Um ritgerðin ikki verður latin inn tá, ella hon ikki verður góðkend fyrstu ferð, verður tann lesandi sjálvvirkandi skrásettur at skula lata inn næstu ferð við freist, sum er tríggjar mánaðir seinni. Verður masterritgerðin ikki latin inn tá, ella verður hon fyri fyri aðru ferð ikki góðkend, verður tann lesandi sjálvvirkandi skrásettur at skula lata inn næstu og seinastu ferð við freist, sum er 3 mánaðir seinni. Verður masterritgerðin ikki latin inn tá, ella verður hon á triðja sinni ikki góðkend, verður tann lesandi sjálvvirkandi meldaður út sum lesandi á Setrinum. Mannagongdir og reglugerð í sambandi við undantaksloyvi til at lata masterritgerðina inn á 4. sinni eru lýstar niðanfyri.

Tað er ikki neyðugt hjá tí lesandi at broyta evni í næstu og triðju royndini, men innihaldið í masterritgerðini skal broytast munandi/betrast fyri at ritgerðin verður góðkend.

Í serligum føri kann tann lesandi søkja um loyvi at lata masterritgerðina inn á 4. sinni. Í slíkum føri, skal tann lesandi skriva og lata dekaninum eina formliga og væl grundaða umbøn í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at hann/hon fekk boðini um, at masterritgerðin ikki var góðkend.

Masterritgerðin skal latast inn gjøgnum telduskipan Setursins og til deildarskrivstovuna. Pappírsútgávan, sum verður latin deildarskrivstovuni, skal vera innbundin og í trimum eintøkum. Tann lesandi útfyllir eitt oyðublað við boðum um, hvussu og hvørt ritgerðin kann vera almenn.

Fyri at fáa farloyvi er skjalprógv frá lækna neyðugt. Um so er, at tann lesandi er sjúkur í longri tíðarskeið í skeiðshálvuni, kann innlatingarfreistin verða broytt í samráð við útbúgvingarleiðaran.

Masterritgerðin og innihaldsyvirlitið skal hava álítandi og ein akademiskt góðkendan keldulista (Harvard, Chicago, osv.).

Longdin á masterritgerðini og úrtakinum (abstract) (forsíða, innihaldsyvirlit, myndir, grafar, tabellir, fótnotur, keldulisti og fylgiskjøl ikki íroknað) skal í mesta lagi vera:

- Ein lesandi: 27.500 - 31.500 orð
- Tvey lesandi: 37.500-40.500 orð
- Trý lesandi: 47.000-50.000 orð

Lesandi, ið skriva masterritgerð í bólki, verða mett einsæris til munnligu próvtøkuna. Tó verður masterritgerðin mett sum eitt avrik, sum allur bólkurin sum ein eind hevur skrivað.

Í ritgerðini skal hetta vera:

- Forsíða við heiti á uppgávu, navn á tí lesandi/teimum lesandi, lestarnummar/-nummur, navn á vegleiðara, innlatingardagur og tal á orðum.
- Eitt úrtak (abstract) á føroyskum og enskum (í mesta lagi 350 orð).
- Innihaldsyvirlit.
- Keldulisti.

Uppsetingin skal hava:

- Eina linjufrástøðu, sum er í minsta lagi 1,5 cm.
- Síðutøl.

Fylgiskjøl kunnu verða prentað skjøl ella leinki.

Um masterritgerðin ikki lýkur hesi krøv, kann avleiðingin vera, at hon verður ikki góðkend sum innlatin ella mett ikki at verða staðin.

## 7.6 Metingarhættir (formativ og summativ meting)

Lesandi verða mett við at nýta fleiri sløg av metingarhættum, t.d. formativa meting, summativa meting, meting frá øðrum lesandi og umsjón. Neyvari lýsing av eftirmetingarhættunum er at lesa í skeiðslýsingunum fyri einstøku skeiðini.

### 7.7 Próvtøkur

Reglugerðir um allar próvtøkur á Setrinum eru at lesa í kunngerð frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum:

https://setur.cdn.fo/media/7807/kunnger%C3%B0-99-juni-17-2021.pdf?s=XDWi5YekJ-As99zYKMqkd1L2oqs

#### *7.7.1 Almennar reglur um próvtøkur*

Øll lesandi verða sjálvvirkandi meldað til allar próvtøkur á bæði kravdum skeiðum og valfríum skeiðum. Um so er, at lesandi ikki letur eina uppgávu inn til ásetta freist, ella ikki møtir til eina skrivliga ella munnliga próvtøku, stendur hann/hon ikki próvtøkuna og verður skrásettur at hava brúkt ein av trimum møguleikum til próvtøkuna. Tá lesandi er skrásettur at hava valt eitt valfrítt skeið, verður hann/hon sjálvvirkandi skrásettur til próvtøkuna í hesum skeiði. Fyri at melda frá til próvtøkuna, skal tann lesandi melda frá í seinasta lagi tvær vikur eftir fyrsta undirvísingartíma á hvørjum einstøkum skeiði. Hetta verður gjørt við at tann lesandi meldar frá í telduposti til undirvísaran á skeiðinum.

#### *7.7.2 Raðfylgja av próvtøkum í lestrargongdini*

Talva 1 Raðfylgjan av próvtøkum

| Lestrar-hálva | Skeið | Próvtøka | Endur-próvtøka | Meting | Stigi | ECTS |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Vísindaástøði og háttalag á master | Skrivlig uppgáva | Sama | Innanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| | Samfelagsvísindi og stjórnmálafrøði í smátjóðum og oyggjasamfeløgum | 1) Miðskeiðis munnlig framløga í flokkinum (staðin/ikki staðin) og 2) einstaklingaskrivað uppgáva. Fyri at skeiðið skal vera staðið, skal tann lesandi standa báðar partar hvør sær. | Sama | Innanhýsis | Staðið/ ikki staðið og 7-talsstigin | 10 |
| | Masterverkætlan | Skrivlig uppgáva við munnligari verju | Sama | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 10 |
| 2. | Valfrí skeið | Veldst um skeiðið, sum tann lesandi hevur valt | | | | 30 ECTS samanlagt |
| 3. | Praksislæra | Skrivlig uppgáva við munnligari verju | Sama | Innanhýsis | 7-talsstigin | 25 |
| | Fyrireikandi skeið til masterritgerð | Skrivlig uppgáva | Sama | Innanhýsis | 7-talsstigin | 5 |
| 4. | Masterritgerð | Skrivlig uppgáva við munnligari verju | Sama | Uttanhýsis | 7-talsstigin | 30 |

Masterritgerðin (30 ECTS) er seinasti parturin í útbúgvingini, og tí er tað vanliga neyðugt, at tann lesandi havur staðið øll tey neyðugu skeiðini (90 ECTS points), áðrenn hann/hon byrjar uppá masterritgerðina. Hóast hetta kunnu lesandi fáa loyvi at byrja uppá masterritgerðina, um

tey frammanundan hava staðið í minsta lagi 80 ECTS. Útbúgvingarleiðarin metir um hendan møguleikan í hvørjum einstøkum føri.

### *7.7.3 Innanhýsis ella uttanhýsis próvdøming*

Próvdømingin kann vera við uttanseturs ella innanseturs próvdómara. Tá próvdømingin er uttanseturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttanseturs próvdómarar skulu góðkennast av Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tá próvtøkan er innanseturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og starvsfólki á Fróðskaparsetrinum.

Í minsta lagi 1/3 av próvtøkunum (roknað í ECTS-stigum) skulu próvdømast av uttanhýsis próvdómara. Kliniskir partar av útbúgvingini og starvsvenjing eru undantikin. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

Tey 30 ECTS-stigini á 2. lestrarhálvu, sum hin lesandi sjálvur velur, kunnu vera annaðhvørt innanhýsis ella uttanhýsis. Hetta er tengt at, hvørji skeið hin lesandi velur, og hvørjar próvtøkuásetingar eru galdandi fyri hesi skeið.

### *7.7.4 Galdandi próvtalastigi; staðið/ikki staðið*

Í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (roknað í ECTS-stigum) kunnu verða dømdar staðið/ikki staðið. Kliniskar próvtøkur, starvsvenjing og avriksflutningur eru undantikin.

Próvdømingin verður givin sum met eftir 7-talsstiganum ella sum “staðið/ikki staðið”. Fyri at hava staðið skeiðið krevst metið 02.

### *7.7.5 Endurprovtøka og sjúkraprovtøka*

Rætturin til endurprovtøku er treytaður av, at møtt verður til regluligu próvtøkuna. Tá talan er um sjúku, er rætturin til sjúkraprovtøku treytaður av, at sjúkraváttan er latin Setrinum rættstundis og á rætta stað.

Skipað verður fyri endurprovtøkum tvær ferðir um árið. Fyri skeið í heysthálvuni eru endurprovtøkurnar í várhálvuni. Fyri skeið í várhálvuni eru endurprovtøkurnar í heysthálvuni. Útbúgvingarleiðarin ásetir neyvari dagfestingar.

Tann lesandi kann í mesta lagi fara til próvtøku tríggjar ferðir í sama skeiði. Um skeiðið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurprovtøku tvær ferðir. Dekanurin kann geva loyvi til eina fjórðu próvtøku eftir skrivligari umsókn, um serligar umstøður tala fyri tí. Øll lesandi eru sjálvvirkandi meldað til tær próvtøkur, sum eru á teirra útbúgving, bæði fyrstu próvtøku og endurprovtøkur. Í sambandi við sjúkraprovtøkur skulu tey lesandi sjálv søkja um sjúkraprovtøku við at seta seg í samband við umsitingina og útbúgvingarleiðara.

Um ein lesandi gerst sjúkur og ikki kann fara til próvtøku, er møguligt at fara til sjúkraprovtøku. Fyri at fara til sjúkraprovtøku krevst læknaváttan, sum skal latast skrivstovuni í seinasta lagi tríggjar dagar eftir próvtøkudagin. Um serligar umstøður eru, kann dekanurin geva loyvi til frávik frá hesum. Sjúkraprovtøka telur ikki sum endurprovtøka.

Lesandi, sum ikki hevur staðið eitt skeið á útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina. Stk. 9.5 lýsir møguleikan hjá lesandi at søkja um eitt fjórða høvi, um serligar umstøður gera seg galdandi.

#### 7.7.5.1 Frámelding til próvtøku

Fyri at verða roknaður sum virkin lesandi skal tann lesandi fara upp til próvtøku við fyrsta próvtøkuhøvi. Møguligt er at melda seg frá próvtøkuni, og skal hetta gerast í seinasta lagi 14 dagar eftir, at skeiðið er byrjað. Lesandi, sum ikki meldar seg frá próvtøku innan hesa freist og heldur ikki møtir til próvtøku, verður skrásettur sum ”ikki staðið”, og telur hetta við í teimum trimum møguleikunum, tann lesandi hevur at fara upp til próvtøku. Frámelding til próvtøku verður gjørd við at senda teldupost til skrivstovuna og skeiðsábyrgdara.

### *7.7.6 Serlig atlit*

Um tann lesandi hevur skerdan førleika, sálarliga ella kropsliga, verður tikið fyrilit fyri hesum innanfyri ásettu karmar í LØGTINGSLÓG NR. 58 FRÁ 9. JUNI 2008 UM FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 51 FRÁ 8. MAI 2012, kap. 6 § 20-20.a. Talan kann vera um longda próvtøkutíð, hjálparamboð o.s.fr. Nærri kunning um hetta fæst hjá lestrarvegleiðaranum á Søgu- og samfelagsdeildini.

## 7.8 Undirvísingarmál

Undirvísingarmálið og próvtøkumálið er vanliga føroyskt. Tó kann undirvísingarmálið og próvtøkumálið vera annað skandinaviskt ella enskt mál, um hin lesandi, lærarin ella próvdómarin ikki skilir føroyskt. Um ein lesandi hevur ynski um at fara til skrivliga ella munnliga próvtøku á enskum ella norðurlendskum máli, skal undirvísarin geva loyvi til hetta. Er talan um valskeið, har undirvísingin er á skandinaviskum ella enskum máli, verður próvtøkan á sama máli sum undirvísingin.

## 7.9 Góðskriving

Um lesandi hevur staðið skeið á øðrum universitetum, sum eru á sama ella hægri fakligum stigi við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingina sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi skeið góðskrivað sum partur av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Endalig avgerð um, hvørt eitt skeið verður góðskrivað, verður tikin av lestrarráðnum.

Søkjast kann so hvørt gjøgnum árið, men um lesandi ynskir at umsóknin skal verða viðgjørd, áðrenn lestrarhálvan byrjar, so er freistin hendan:

- Seinasta freist fyri várhálvuna: 15. septembur
- Seinasta freist fyri heysthálvuna: 15. februar

Mannagongdin fyri góðskriving er, at hin lesandi letur deildini umsókn um góðskriving. Í umsóknini skal vera greitt, hvat skeið, sum er staðið, skal góðskriva annað skeið. Sí nærri kunning um góðskrivingar her: https://www.setur.fo/fo/lestrarliv/um-lestur/avriksflutningur/

Útbúgvingarleiðarin letur undirvísara umsóknina um góðskriving til stutta viðmerking og at taka undir við. Tá hetta er gjørt, letur útbúgvingarleiðarin lestrarráðnum umsóknina saman við viðmerkingini hjá fakundirvísaranum. Lestrarráðið staðfestir síðani góðskrivingina.

## 7.10 Farloyvi

Møguligt er at gera avtalu um farloyvi við Setrið og í samráð við umsitingina. Søkjast kann um farloyvi við at venda seg til Lestarskrivstovuna. Sí galdandi kunngerð: https://www.setur.fo/fo/lestrarliv/um-lestur/farloyvi/

## 7.11 Serlig atlit (sjúka, brek og annað)

Setrið kann veita stuðul til lesandi, sum hava serligan tørv á hesum, t.d. teknmál, orðblindi og fysiskar karmar til rørslutarnað. Nærri kunning fæst við at venda seg til lestarvegleiðingina umframt Lestrarskrivstovuna.

## 7.12 Altjóða útbúgvingarmøguleikar (t.d. lestrarvist)

Onnur lestrarhálvan er skipað sum valfrí skeið, og í hesum sambandi er gjørligt at taka annaðhvørt ein part ella alla næstu lestrarhálvuna á MA-stigi á øðrum universiteti uttanlands. Skeiðini, sum verða tikin á næstu lestrarhálvu uttanfyri Søgu- og samfelagsdeildina, skulu undangóðkennast. Lesandi søkja um undangóðkenning við at senda umsókn til umsitingina á Søgu- og samfelagsdeildini og til útbúgvingarleiðaran. Um lesandi hevur staðið skeið á MA-stigi á øðrum universiteti, kann viðkomandi søkja um góðskriving.

Lestrarvegleiðarin á SSD vegleiðir um viðurskifti og møguleikar í hesum sambandi í samstarvi við útbúgvingarleiðaran.

## 7.13 Luttøkuskyldu

Uppmøting og virkin luttøka er fortreyt fyri at tryggja góðskuna í undirvísingini og læring hjá lesandi. Tí er krav um virkna luttøku á einstøku skeiðunum ein fortreyt og nærri lýst í skeiðslýsingunum og skráum fyri ymsu skeiðini. Tó er ikki ásett nøkur skylda hjá lesandi at møta upp til alla undirvísingina sum heild.

## 7.14 Lestrarvirkni

Væntað verður, at hin lesandi møtir regluliga til undirvísing. Harumframt verður væntað, at tann lesandi er fyrireikaður til undirvísing, luttekur í kjaki og framløgum, umframt at tann lesandi tekur ábyrgd fyri egnari læring.

## 7.15 Eftirmeting av útbúgving og skeiðum

Skeið verða eftirmett kvantitativt og einsæris eftir einum felags leisti galdandi fyri øll skeið á Setrinum. Tó er ikki nakað, sum forðar fyri, at aðrar eftirmetingar (serliga kvalitativar) verða settar í verk á einstøku útbúgvingunum.

Tað hevur týdning, at hin lesandi luttekur í eftirmetingunum, og at úrslitini frá eftirmetingunum verða nýtt til at gera áhaldandi tillagingar á útbúgvingunum. Tískil er tað ein ábyrgd hjá lesandi at útvega vitan um, hvussu hin lesandi upplivir at vera lesandi á útbúgvingini umframt, hvussu hin lesandi hevur upplivað einstøku skeiðini.

Á hvørjum ári skipar Lestrarráðið fyri einari felags munnligari eftirmeting, har umboð fyri allar útbúgvingar og árgangir luttaka.

## 7.16 Kærumøguleikar

Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni, verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Søgu- og samfelagsdeildini. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd fyri lesandi. Heimild og kæruvegleiðing er at finna í Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, kapittul 6a: https://www.setur.fo/fo/setrid/um-setrid/logir-og-reglugerdir/

## 7.17 Vísindaligt rættlæti

Ritstuldur og svik verður ikki góðtikið. Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, fær hetta avleiðingar. Tann lesandi má fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt at lata vera við at upplýsa ella at dylja á slíkan hátt, at villleiðing stendst av avriki hjá lesandi. Til dømis metist tað sum at dylja ikki at upplýsa allar heimildir til ritgerð. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er endurgeving, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og hin lesandi ikki eigur, eru fingnar.

Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum lesandi ikki sjálvur hevur skrivað, ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur. At endurnýta partar av uppgávu er somuleiðis svik. Allar skrivligar uppgávur verða kannaðar fyri ritstuldur við URKUND-skipanini.

## 7.18 Nær lesandi í seinasta lagi skulu hava staðið endaligt prógv

Virkin lesandi skulu hava staðið útbúgvingina trý ár eftir lestrarbyrjan. Um lesandi fara í farloyvi, er hann/hon ikki virkin og kann tí brúka longri tíð. Um lesandi ikki framleiðir nakað ECTS í eitt ár, fær viðkomandi skriv um útskriving av Setrinum. Víst verður annars til kunngerðina hjá Fróðskaparsetri Føroya hesum viðvíkjandi: https://www.setur.fo/fo/setrid/um-setrid/logir-og-reglugerdir/

## 7.19 Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og hesar skulu góðkennast av lestrarráðnum. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan. Dekanurin á Søgu- og samfelagsdeildini skal kunna avvarðandi starvsfólk og lesandi, tá broytingar eru framdar í námsskipanini. Tá broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu tey lesandi kunnast um, í hvønn mun tey fylgja broyttu námsskipanini ella fylgja eldri námsskipan. Herundir skulu tey lesandi kunnast um tíðarfreistir at gera lesturin lidnan eftir eldri námsskipan. Um tað ikki eydnast lesandi at gera lesturin lidnan innan ásettu freist, má søkjast um at fáa tann partin av útbúgvingini, sum hevur fylgt eldri námsskipan, góðskrivaðan, áðrenn farið verður undir at fylgja nýggju námsskipanini. Tá verða yvirskipaðu mannagongdirnar í sambandi við góðskriving fylgdar.

Um bygnaðurin á útbúgvingini ger tað møguligt, kann tað standa tí lesandi í boði at skifta frá eldri námsskipan til nýggja. Hetta kann t.d. vera, um útbúgvingin er býtt sundur í tveir partar. Tá fyrri partur er staðin, ber til at skifta til nýggja námsskipan á seinna parti. Námsskipanin skal vera tøk á heimasíðu Fróðskaparsetursins.

## 7.20 Aðrar ásetingar

### *7.20.1 Útskriving*

Velur tann lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda seg til deildarskrivstovuna á Søgu- og Samfelagsdeildini og við at útfylla oyðublað til hetta endamál. Gerast skal vart við, at um tann lesandi vil byrja lesturin aftur, skal hann/hon søkja umaftur á jøvnum føti við onnur lesandi.

### *7.20.2 Samskifti*

Samskifti við lesandi skal yvirhøvur fara fram við kunningartøkni (t.d. t-post, heimasíðu, Moodle, o.t.).

### *7.20.3 Lestrarárið*

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í sambandi við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið. Tó er vanligt, at summarskeið, seminar og verkstovur kunnu liggja uttanfyri formliga lestrarárið.